

DÁLKINGARFUNDUR

*Vágs Býráð vil ikki sláa seg til tols við, at oljudálkingin í Vági 14. mai, bara var eitt óhapp, sum ongin kundi gera nakað við og nú vilja tey hava eina forkláring frá SEV*

aki@sosialurin.fo

# Vilja hava SEV at ansa betur eftir oljudálking

**OLJUDÁLKING** Eftir tvey álvarslig óhapp hesi seinastu árini, vil Vágs Býráð nú á tal við SEV um at ansa betri eftir so at olja ikki rennur á sjógv. Summir býráðslimir krevja eina null hugsjón á økinum

Áki Bertholdsen

Elfelagið SEV hevur verið dýrt fyri umhvørvið á Vágsfirði!

Tvær ferðir hesi seinastu trý árini hava óhapp við tangarnar hjá SEV elvt til umfatandi oljudálking á Vágsfirði.

Seinast var nú 14. Mai, tá ið nógv olja rann á sjógv, men serliga alvorligt var tað fyri trimum árum síðani, tá ið nógv tungolja fór á sjógv og elvdi til umfatandi dálking um allan fjørðin, bæði í sjálvari mølini, men eisini á alt lív á og í sjónum.

**» Hetta ber ikki til**

Tað dálkingina arbeiddu tey í hálvt annað ár við at basa.

Men hetta er bara tann sjónligi parturin av dálkingini, tí kanningar hjá Umhvørvisstovuni vístu, at fyri ikki so langari tíð síðani var djóralívið í fjørðinum framvegis dálkað.

## Ber ikki til

Men á seinasta fundi var semja um í Vágs Býráði, at hetta ber ikki til longur.

Tí samtykti býráðið at biðja um fund við SEV at tosa um viðurskiftini.

Býráðslimir førdu fram at nú á døgum eru trygdarskipanirnar so góðar, at tað eigur at bera til at sleppa undan slíkum, serliga hjá SEV, sum hevur fólk á vakt alt samdøgurið.

Tað var enntá onkur býráðslimur sum helt, at býráðið skuldi rætt og slætt krevja eina null-hugsjón á hesum øki. Altso halda teir, at kravið til SEV skal vera, at tað setir skipanir í gildi, so at ongin olja yvirhøvur sleppur á sjógv.

Býráðið vil eisini tosa við SEV um at elfelagið sjálvt hevur eina ávísa tilbúgving, so at ein møgulig dálking kann basast skjótt og effektivt.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, sigur, at áheitan er send SEV um at koma á fund um støðuna.

– Annars hava vit fingið at vita frá SEV, at vit fáa eina frágreiðing um hesa seinastu dálkinginga, skoytir hon upp í.

Her eigur eisini at verða lagt afturat, at hesar báðar dálkingarnar hjá SEV hava ikki kostað kommunini nakað fíggjarliga, tí SEV hevur goldið fyri ruddingina.

## Løgreglan kannar oljudálking hjá SEV

**Fútin skal nú gera av um oljudálkingin á Vágsfirði síðsta fríggjadag, skal fáa avleiðingar fyri SEV ella ikki.**

Tað var fríggjamorgunin 14. mai, at fólk varnaðust, at rættiliga fitt av olju rann á sjógv úr tangaskipanini hjá SEV í Vági.

Løgreglan varð fráboðað og síðani hevur hon gjørt tær kanningar og avhoyringar, sum skulu til.

Jaspur Vang, økispolitileiðari í Suðuroy, sigur, at tey eru við at leggja síðstu hond á kanningarnar og nú og hann væntar, at málið verður avgreitt seinni í hesi vikuni.

Hann sigur, at tá verður málið latið fútanum, sum so skal taka støðu til um SEV, ella onkur annar, skal ábyrgdast fyri óhappið og um tað í so fall skal fáa avleiðingar.

# Mugu fáa greiðar mannagongdir

**Stjórin í SEV sóknast eftir at ein greið tilbúgving verður gjørd í sambandi við oljudálkingar**

Áki Bertholdsen

Vit mugu hava eina greiða mannagongd fyri, hvussu vit basa oljudálkingum í Føroyum.

Tað heldur, Hákun Djurhuus, stjóri á SEV, sum er púra samdur Kommunusamskipan Føroya, ið nú fer at reisa málið í landsstýrinum.

– Vit mugu fáa eina greiða linju ímillum, hvussu langt ein kommunal tilbúgving skal røkka og, hvar ein landstilbúgving skal taka við, sigur SEV stjórin.

Hann hevur ikki enn svarað umbønini frá Vágs Býráði um fund um óhappið, sum førdi til umfatandi dálking 14. mai, men svarið verður sent skjótt.

Hann sigur eisini, at so leingi ein greið tilbúgving ikki er gjørd, er tórført at siga, hvør skal hava ábyrgdina av at taka upp eftir eina oljudálking.

*Vágs Býráð heldur, at kanska átti SEV at havt eitt sindur av útgerð liggjandi, so at tað ber til at basa smærri dálkingum?*

– Alt skal betalast. Og hvat er eitt sindur og hvussu langt skulu vit í SEV fara, spyr Hákun Djurhuus afturímóti.

Tí heldur hann, at landið og kommunurnar nú skulu seta seg saman og gera eina greiða tilbúgving, tí tað er fortreytin fyri at koma víðari

aki@sosialurin.foww